UTTAN ÚR HEIMI

# Ímóti kríggi

Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, fær ikki so stóra undirtøku longur fyri ætlan síni um at fara í kríggj við Irak saman við amerikanarunum.

Ein meiningakanning í gjár vísti, at nú taka bara 32 prosent av bretum undir við ætlan forsætisráðharrans. Fyri einari viku síðani svaraðu 38 prosent, at Blair hevði tikið ta røttu avgerðina.

Kanningin vísir eisini, at nú eru 41 prosent ímóti krígsætlanini. Tað er at kalla tað sama saum í undanfarnu kanningini. Harafturímóti eru tað fleiri, sum ivast. Nú eru tað 27 prosent, sum ikki vita, hvørt avgerðin hjá Blair er røtt ella ikki. Tað søgdu 21 prosent fyri átta døgum síðani.

# Ov stóra løn

Tveir ráðharrar í nýggju sosialdemokratisku stjórnini í Svøríki eru komnir í andglettin, eftir at tað er komið fram, at teir forvinna meiri enn 100.000 krónur um mánaðin.

Tað snýr seg um ráðharran í innflytaramálum, Jan O. Karlsson. Umframt sína ráðharraløn fær hann eina mánaðarliga samsýning úr Bruxelles, har hann arbeiddi, áðrenn hann gjørdist ráðharri. Hin ráðharrin, sum er komin í andglettin, er Leni Bjørklund, verjumálaráðharri, sum fær pensjón aftur at ráðharralønini.

Leni Bjørklund hevur boðað frá, at hon fer at siga pensjónina frá sær, men Jan O. Karlsson sigur tvørturímóti, at hann hevur onga ætlan um at siga ES-pengarnar frá sær.

# Njósnari slatraði

Ein rættur í London hevur dømt fyrrverandi njósnaran David Shayler sekan í at hava brotið sína tagnarskyldu, sum hann svór at halda, tá hann arbeiddi sum njósnari hjá bretsku fregnartænastuni MI5.

Í 1997 gav David Shayler blaðnum The Mail loyniligar upplýsingar. M. a. greiddi hann blaðnum frá loyniligum sambandi millum IRA og Libya, eins og hann avdúkaði ymsar loyniligar upplýsingar um núverandi uttanríkisráðharran, Jack Straw, og fyrrverandi ráðharran Peter Mandelsohn.

Sjálvur sigur David Shayler, sum gavst sum njósnari í 1996, at ætlan hansara var ikki at koma nøkrum í vanda, men at hann bert ætlaði at vísa á veikleikar í arbeiðinum hjá MI5. Í rættinum segði hann, at hann metir seg ikki vera nakran landasvíkjara, hóast hann breyt reglurnar um tagnarskyldu.

# Gírigur skoti var ríkur

Skotin Edward Reid var sum so mangir av landsmonnum hansara tiltikin gírigur.

Í húsi hansara var eingin miðstøðuhiti, og hann bøtti hvønn klodda heldur enn at keypa sær nýggj klæðir. Bilurin, sum hann hevði, var ein gamal og illa rustaður Ford Fiesta, og hóast bileftirlitið fleiri ferðir hevði kravt, at hann skuldi umvæla bilin og skifta lutir í honum, sýtti hann fyri at gera eftir kravinum. Tað var alt ov dýrt, segði hann, og tí gjørdi hann heldur av at seta bilin.

Nú er Edward Reid deyður, og nú er komið fram, at hann átti bæði partabrøv og nógvar pengar í bankanum. Einar 200 milliónir krónur er virðið uppgjørt til.

# Nýval í Ísrael

**Ariel Sharon, forsætisráðharri noyddist í gjár at biðja Moshe Katsev, forseta skriva út nýval**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*

Ísraelsmenn skulu á val tann 4. februar at velja nýggj umboð í tjóðartingið Knesset.

Avgerðin um at skriva út nýval varð tikin, eftir at tað miseydnaðist Ariel Sharon, forsætisráðharra at halda fram við Likud-stjórnini. Sharon rosyndi at leita sær stuðul hjá tí víðgongda høgraflokkinum Tjóðskaparlig Eind, men flokkurin sýtti fær at arbeiða saman við einari stjórn, sum hevur viðurkent, at palestinar skulu fáa sítt egna ríki.

Sharon hevði tí ikki annað í at velja enn at biðja Moshe Katsev, forseta skriva út nýval.

Nýval var eisini kravið hjá floksfelaga Sharons, Benjamin Netanyahu, sum segði seg vera sinnaðan at taka við sum uttanríkis-ráðharri, men bert um Sharon samstundis gekk við til at skriva út nýval um stutta tíð. Politiskir eygleiðarar í Jerusalem siga, at kravið hjá Netanyahu hevur uttan iva samband við ætlan hansara um at taka við sum formaður í Likud-samgonguni eftir Sharon og harvið eisini gerast forsætisaráðharraevnið hjá samgonguni.

Veljarakanningar hava fyrr víst, at Netanyahu fær størri undirtøku millum ísraelsmenn enn Sharon.

Stjórnarkreppan í Ísrael tók seg upp, tá Arbeiðaraflokkurin tók seg úr stjórnini í síðstu viku.



*Ariel Sharon hugsunarsamur við borðið í Knesset. Men hann hevur eisini orsøk til at vera hugsunarsamur, nú veljararnir skulu taka støðu um framtíð hansara.*

# Spennandi val í USA

**Tað eydnaðist í ávísan mun George W. Bush, forseta at draga yvirgang og tjóðskaparliga trygd fram í valstríðnum og at fáa fólk at gloyma tann vánaliga búskapin**

VAL Í USA
*Árni Joensen*

Valstríðið upp undir amerikanska miðvalið í gjár var ógvuliga hart, og eygleiðarar siga, at sjáldan hava teir báðir flokkarnir stríðst so leingi og lagt so stóran dent á at vinna ta seinastu atkvøðuna sum hesaferð.

Hjá Bush forseta og republikanarunum snýr valið seg fyrst og fremst um at fáa meiriluta í senatinum. 34 av teimum 100 senatorunum standa fyri vali hesaferð, og republikanararnir skuldu bert fáa ein senator afturat fyri at tryggja sær meiriluta.

Í umboðsmannatinginum hava republikanararnir hinvegin meiriluta við 223 umboðum ímóti teimum 208 hjá demokratunum. Har stóðu øll tey 435 umboðini fyri vali í gjár, men roknað varð ikki við, at nøkur stórvegis broyting fór at henda í býtinum millum flokkarnar.

Umframt senatið og umboðsmannatingið stóðu 36 av teimum 50 guvernørunum fyri vali í gjár, teirra millum bróður forsetans, Jeb Bush, sum er guvernørur í Florida.

Tær seinastu veljarakanningarnar undan valdegnum vístu, at tað stóð at kalla á jøvnum millum republikanarar og demokratar. Undir valstríðnum hevur Bush forseti roynt at sannføra amerikanarar um, at tað ræður um at tryggja forsetanum neyðugar heimildir, nú landið er fyri ágangi frá altjóða yvirgangsmonnum. Demokratarnir hava hinvegin víst á ta skeivu gongdina í búskapinum, sum m. a. hevur gjørt, at nógvir ameri-kanarar eru vorðnir arbeiðsleysir.

# Elizabeth drotning í andgletti

**Nógvir bretskir politikarar krevja, at Elizabeth drotning skal missa ein part av sínum órini, so hon kann avhoyrast í rættinum**

BRETLAND
*Árni Joensen*

Nógvir bretskir politikarar eru í øðini, eftir at Elizabeth drotning hevur steðgað einum rættarmáli ímóti fyrrverandi tænaranum hjá Dianu prinsessu, Paul Burrell.

Ákæruvaldið hevði ákært fyrrverandi tænaran fyri at hava stolið næstan 300 lutir hjá fyrrverandi prinsessuni, men sjálvur hevur Paul Burrell alla tíðina sagt, at hann hevði bert lutirnar í varðveitslu fyri kongshúsið.

Í síðstu viku kom fyrrverandi tænarin fyri rættin, men júst sum hann skuldi vitna í rættinum, legði Elizabeth drotning seg út í málið. Hon setti seg í samband við ákæruvaldið, og nú segði hon seg minnast, at Paul Burrell í 1998 hevði sagt sær, at hann hevði lutirnar hjá Dianu prinsessu í varðveitslu.

Løgreglan fekk ikki gjørt annað enn at sleppa málinum, men nógvir bretar undrast á, at drotningin brádliga fekk so gott minni. Tí eru tað mong, sum spyrja, um drotningin var bangin fyri, at fyrrverandi tænarin fór at avdúka okkurt í rættinum, sum kundi koma kongshúsinum illa við.

### Lógin má broytast

Fleiri parlamentslimir hjá arbeiðaraflokkinum eru so illir, at teir krevja galdandi lóg sum serrættindi hjá drotningini broytta. Ein av hesum reglum snýr seg um órin, og sambært henni ber ikki til at krevja drotningina til avhoyringar í einum rætti. Men hendan rætt eigur drotningin at missa aftan á tilburðin í síðstu viku, siga parlamentslimirnir.

Teir liberalu demokratarnir í parlamentinum eru eisini í øðini, og teir hava kravt, at drotningin skal rinda tær 17 milliónir krónurnar, sum rættarmálið hevur kostað ríkiskassanum.

Men stigið hjá drotningini var ikki nóg mikið til at fáa Paul Burrell at tiga, var tað tað, sum drotningin ætlaði. Fyrrverandi tænarin hevur hevur játtað at siga blaðnum Daily Mirror sína søgu, og fyrsti partur stóð í blaðnum í gjár. Fyri søguna fær Paul Burrell einastaðni millum 2,9 og 4,8 milliónir krónur.

